# l 30 ár á sama arbeiðsplássi





*Katrin Johansen við soninum, Bjartur*



*Malena Arnoldsdóttir á vatninum*

eru tað millum annað børn hjá teimum, sum vóru børn í barnagarðinum fyrstu árini, tá ið eg var har, sum eiga børn í barnagarðinum, sigur Kristianna.

Kristianna er liðug at greiða frá. Tað er heilt friðarligt í salinum. Hon var send úr heimbygdini Sumba, tá ið hon var ellivu ára gomul. Sum so mong onnur varð hon send av landinum og á Rødbygaard. Hon kendi seg innibyrgda, men tá ið umstøðurnar í Føroyum fyrst í sjeyti árunum broyttust, kom hon aftur til Føroya í 1973. Tá var hon gott og væl tjúgu ára gomul. Hóast brek so fekk hon møguleika at liva sum onnur og at hava vanligt arbeiði. Nú hevur hon keypt sær hús, og hon roynir at hjálpa øðrum, sum hava brek og fyri neyðini at verða stuðlað og hjálpt.

- Sum eg segði, so kenni eg ikki beiskleika. Eg havi góðtikið, at umstøðurnar vóru so nógv øðrvísi, tá ið eg var barn og ung. Í dag gleðist eg um, at tey, sum vóru við mær á hesi leguni, tá ið tey vóru smá, framvegis eru her, nú tey eru vorðin hálvvaksin og vaksin. Nú hjálpa tey til, og tað dámar mær væl, sigur Kristianna Kjærbo.

long. Hon varð send á Nykøbing Falster ungdómsskúlan.

- Har var gott at koma og vera. Har vóru eingir múrar, og har vóru fleiri møguleikar. Eg arbeiddi í kafeteria og í køkinum, og vit høvdu skúlatímar í eitt nú træsmíði. Seinni arbeiddi eg eisini í fruktplantagu, og tað bar mær til at vitja fólk, uttan at nøkur vakt skuldi fylgjast við mær.

Tá ið tíðin á eftirskúlanum var liðug, fór Kristianna at arbeiða í einum vaskaríi, og so var tað, at møguleikin fyri at flyta aftur til Føroyar og tað, sum hon kendi sum sítt og hevði kært, gjørdist veruleiki. Hetta var í 1973.

- Mær dámdi væl at flyta heim til Føroya og til Havnar. Fyrstu tíðina vóru vit fleiri, sum arbeiddu á verkstaðnum í Losjuni við Tinghúsvegin. Men so var tað, at eg fekk arbeiði í Drotning Ingriðar barnagarði, og har havi eg verið síðani.

Kristianna sigur, at henni hevur dámt ógvuliga væl at arbeitt í barnagarðinum.

– Eg eri sera góð við arbeiðsplássið og tey fólkini, sum hava arbeitt har, og sum arbeiða har. Eg havi eisini kent meg væl móttikna, og starvsfelagarnir eru góðir við meg. Og eg havi altíð havt stóran tokka til børnini, og tey hava verið góð við meg. Nú

*Jimmy, sum vit eisini kenna úr Ælaboganum, hevur her sett seg við klaverið og mikrofonina á Zarepta*

